**Býráðsfundur hósdagin 25. mars 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Bára Joensen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.45**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **13/00000**<br>**Innkallan av varalimi**<br>Ólavur Olsen hevur boða frá at hann ikki kann røkja býráðsarbeiðið í tíðarskeiðnum 20 mars. til 5 apríl. Borgarstjórin hevur vísandi til kommunustýrislóguna § 18 stk. 2 innkalla varalimin, sum er Tollakur Joensen. Tollakkur hevur boða frá at hann ikki kann møta og tískil er næsta umboð á listanum, Bára Joensen innkalla. | Einmælt samtykt at Bára Joensen tekur sæti í býráðnum og nevndum fyri Ólavur Olsen. |
| 2. | **13/00147**<br>**Val av upptøkunevnd til sambýlini í Eysturkommunu** | Einmælt samtykt at velja hesi í upptøkunevndina fyri eldrasambýlini í Eysturkommunu:<br><br>Jóna Skorðalíð<br>Elinborg Pots<br>Andreas Petersen<br>Ása Hanusson<br>Unn Justinussen |
| 3. | **13/00146**<br>**Val av valnevndum/valstýrum** | Samtykt at velja hesi í valnevndinar/valstýrini:<br><br>**Í Kommunuvalnevndina fyri Eysturkommunu**:<br>Erik Lervig, formaður<br>Sólrun Poulsen<br>Måns Persson<br>**Tiltakslimir:**<br>Jacob Meinhard Sólbjørg<br>Dagmar Jacobsen<br><br>**Í Leirvíkar valstýri/valnevnd:**<br>Eilin Andreasen, formaður<br>Jacob Meinhard Sólbjørg<br>Frida Tróndheim<br>Jákup á Reynatrøð<br>Justinus Eliassen |

**Býráðsfundur hósdagin 25. mars 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Bára Joensen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.45**

**Tiltakslimir:**
Tórhild Bjarkhamar
Ólavur Thomsen

**Í Gøtu valstýri/valnevnd:**
Måns Persson, formaður
Dagmar Jacobsen
Halldóra Ranghamar
**Tiltakslimir**:
Jonhard Joensen
Eli Eirikson

**4.** **13/00000**
**Val av navnanevnd**

Einmælt samtykt at velja hesi í navnanevndina:

Karl Thomsen
Árant Hansen
Borghild Sjúrðaberg
Hákun Andreassen
Hanna Jensen

**5.** **13/00145**
**Val av hegnsýnisnevnd**

Einmælt samtykt at velna hesi í hegnsýnisnevndina

Regin Strømsten
Tórolv Joensen
Jákup á Reynatrøð

**6.** **13/00136**
**Fríðkannarætlan 2013**

Trivnaðarnevndin mælir til at arbeitt verður við einari fríðkannarætlan fyri tey næstu 4 árini. Trivnaðarnevndin fer í næstum hvør í sínum lagi á rundferð í kommununi at gjøgnumganga møgulig fríðkannarøkir í kommununi. Seinni fara allir nevndarlimirnir í trivnaðarnevndini í felag á rundferð.

Trivnaðarnevndin mælir til at ein býargartnari, saman við fólki frá teknisku umsiting verður partur av seinnu rundferðini og vísir á hvørjir møguleikar

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini.

**Býráðsfundur hósdagin 25. mars 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Bára Joensen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.45**

vit hava í komununi.

**7.** **13/00126**
**Grundstykkjalisti**
Formaðurin í byggi- og býarskipanarnevndin hevur biðji um at fáa grundstykkjalistan settan í gildi aftur. Mett var, at undirtøka var á seinasta býráðsfundi at taka grundstykkajlista upp aftur til viðgerðar, soleiðis at býráðið kann taka støðu til málið.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at fáa grundstykkjalista fyri bygdirnar og at gera leiðreglur sum eru greiðir hjá umsøkjarum. Somuleiðis skal kommunan hava greiðar heimildir m.a. at bjóða grundstykki til keypara uttan at gjøgnumganga allan listan hvørja fer ein umsókn kemur inn.

Uppskot er m.a. at senda dagførdan lista út einaferð um árið og at kommunan samstundis hevur eitt yvrilit yvir hvar umsøkjari ynskir at búleikast og hvar skal útstykkjast.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum byggi- og býarskipanar-nevndini.

**8.** **12/00128**
**Umsókn frá Tavuni um byggiloyvi til útbygging**
Eysturkommuna hevur móttikið umsókn frá Tavuni um byggiloyvi til slógvarúm. Byggjast skal uppí verandi bygning og eystureftir. Innrættingin á viðløgdu tekningum er ikki endalig.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at vísa vælvild fyri verkætlanini ið er til fyrimunar fyri virkið, fyri økið og umhvørvi, men endligt byggiloyvi verður givið tá neyvari tekningar og frágreiðingar fyriliggja.

Einmælt samtykt at arbeiða víðar við málinum.

**9.** **13/00115 og 13/00122**
**Kanning av dagstovninum Gjáa**
Kommunan hevur fingið frágreiðing frá Innilufts-tænastuni og frá Landsbyggifelagnum við uppskoti um hvat kann gerðast fyri at fáa loysn á vatninum

Oluffa setti fram soljóðandi broytingaruppskot:

*Samtykt verður beinanvegin at fara undir at*

**Býráðsfundur hósdagin 25. mars 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Bára Joensen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.45**

sum rennur inni í kjallaranum. Umsitingin kannar málið nærri og ger uppskot til umvælingarnar og kostnaðin.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at umvæla bygningin eftir kostnaðarmetingini hjá umsitingini.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at umsitingin fær heimild at bjóða arbeiði út sum 2 undirhondsboð, ella at arbeiðið verður gjørt uppá rokning.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

*projektera og byggja nýggjan barnagarð í Gøtu, sum skal standa liðugur í hesi setuni. Neyðugi peningurin verður settur av við eykajáttan í ár. Samstundis verður samtykt at býráðið setur neyðuga peningi av til at gera bráfengis ábøtur á Gjáa, so hann kann brúkast til ein nýggjur stovnur er liðugur, í seinasta lagi við árslok í 2016. Letur hetta seg ikki gera, má annað fyribilshøli finnast.*

Fyrst bleiv atkvøtt um broytingaruppskoti hjá Oluffu Joensen og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður ímóti:**
Jóhan Christiansen
Brandur Jacobsen
Emma Rasmussen
Hjalti Dalheim
Hanna Jensen
Árni Jacobsen
Bára Joensen

**Atkvøður fyri:**
Oluffa Jacobsen

**Atkvøddi blankt:**
Hanus Jacobsen

Uppskoti er sostatt falli.

Síðana bleiv atkvøtt um tilmæli hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen
Brandur Jacobsen
Hanus Jacobsen
Emma Rasmussen
Hjalti Dalheim
Hanna Jensen
Árni Jacobsen
Bára Joensen

**Býráðsfundur hósdagin 25. mars 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Bára Joensen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.45**

**Atkvøður ímóti:**
Oluffa Jacobsen við tí viðmerking at hon kann ikki taka undir við hesi loysn, tí hon er ikki ein nøktandi langtíðarloysn og tryggjar ikki børnini í Eysturkommunu javnbjóðis ansingartilboð framyvir

Uppskoti er sostatt samtykt.

**10. 13/00138**
**Ung í arbeiði 2013**
Trivnaðarnevndin hevði fund tann 11. mars og mælir nevndin til at játta 2 vikur á 30 tímar pr. ungdóm til ung í arbeiðið. Tekniska umsiting samskipar arbeiðið.

Trivnaðarnevndin mælir til at umsitingin arbeiðir við at orða eina reglugerð fyri ung í arbeiðið.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá trivnaðarnevndini, tó mæla vit frá at brúka orðið tímar pr. ungdóm til ung í arbeiðið, men at her stendur **pr. næming í 9 flokki.**

Somuleiðis mælir byggi- og býarskipanarnevndin til at ”ung í arbeiði 2013” verður fíggja av konto 6.11.32.510 Fríðkan av kommununi (rakstrarjáttan)

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

Fíggjarnevndin mælir somuleiðis til at “ung í arbeiðið” verða brúkt til onkrar ávísar verkætlanir.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur hósdagin 25. mars 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Bára Joensen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.45**

**11. 13/00101**

**Fundarsamsýningar til skrivarar í nevndunum og býráðnum**

Skrivarnir í føstu nevndunum í Eysturkommunu fáa sum er onga fundarsamsýning óðansæð um fundinir eru í ella eftir vanliga arbeiðstíð. Mælt til at hetta verður broytt, soleiðis at fundarsamsýning verður latin skrivarunum í hesum nevndum eftir almennu reglunum um fundarsamsýning, um so er at fundinir eru eftir arbeiðstíð. Eru fundinir í arbeiðstíð verður eingin samsýning latin.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við fyriliggjandi tilmæli.

Fíggjarnevndin mælir tó til, at í tann mun tað er møguligt skal, avspáking verða nýtt ístaðin fyri samsýning.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum fíggjarnevndini.

**12. 13/00152**

**1.viðgerð av eykajáttanum í samb. við gjøgnumgongd av fíggjarætlan fyri 2013**

Fíggjarnevndin mælir til at veita hesar eyakjáttanir:

**Løgujáttanir:**

- 1.540.000,00 kr. á konto 6.30.21.511 **(Vatnveiting)**
- 900.000,00 kr. á konto 6.30.41.511 **(Kloakkir)**
- 1.185.000,00 kr. á konto 4.23.22.511 **(Fólkaskúlin)**
- 440.000,00 kr. á konto 7.38.14.511 **(Havnir og lendingar)**
- 2.040.000,00 kr. á konto 5.24.62.5111 **(Ítróttaranlegg)**
- 1.500.000,00 kr. á konto 3.26.11.511-20 **(Frítíðarheim)**
- 600.000,00 kr. á konto 3.26.11.511-10 **(Barnagarðar)**
- 300.000,00 kr. á konto 5.24.13.511 **(Tilboð og tiltøk innan mentan og frítíð)**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur hósdagin 25. mars 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Bára Joensen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 22.45**

- 150.000,00 kr. á konto 6.22.11.510
  **(Byggibúning bústaðir)**
- 400.000,00 kr. á konto 6.11.32.511
  **(Fríðkan av kommununi)**
- 300.000,00 kr. á konto 6.38.11.511
  **(Vegir)**

**Rakstrarjáttanir:**

- 200.000 kr. á konto 6.11.32.510
  **(Fríðkan av kommununi)**
- 200.000.00 kr. á konto 1.11.11.510
  **(Samsýning til kommunustýrislimir)**

Eykajáttaninar verða fíggjaðar við 4.755.000,00 kr. av innistandandi og 5.000.000,00 við lántøku.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Hanus Jacobsen ______________________________

Emma Rasmussen ______________________________

Hjalti Dalheim ______________________________

Bára Joensen ______________________________

Árni Jacobsen ______________________________

Oluffa Joensen ______________________________

Brandur Jacobsen ______________________________